


# Vandi er í hvørjari vælferð

**Fremsti spælarin í Íløguspælinum hjá Kaupthing og Sosialinum hevur rentað byrjunarupphæddina við 170 prosentum, meðan fremsti spælarin í Børsen's aktiespil í sama tíðarskeiði hevur rentað byrjunarupphædd við 21 prosentum. Les um hvussu hetta ber til og les eisini um norðmannin, sum gjørdist 1,63 milliardir krónur fátækari eftir einum degi.**

ÍLØGUSPÆLIÐ
*Hilmar Simonsen*

Hundrað og sjeyti prosent! So nógv hevur fremsti spælarin í Íløguspælinum hjá Kaupthing og Sosialinum rentað sína byrjunarupphædd við, síðani spælið byrjaði tann 24. september. Tann eina milliónin er sostatt blivin til slakar 2,7 milliónir, og tað er ein øðilig hækking, sum er ring at samanbera við nakað annað.
Eitt annað Íløguspæl, sum koyrir í hesum døgum, er Børsen's aktiespil, sum eisini hevur eina undirdeild í Føroyum promoverað av Eik Banka og Dimmalætting, og tað hevur kanska undrað onkran, at fremsti spælarin í Børsen's aktiespil "bert" hevur rentað sína byrjunarupphædd við uml. 21 prosentum, síðani spælið byrjaði um somu tíð sum Íløgupsælið hjá Kaupthing og Sosialinum.

**Øll eggini í somu kurv**
Orsøkin til hetta er einføld hóast alt og skal finnast í spælitreytunum. Meðan tað í Íløguspælinum hjá Kaupthing og Sosialinum er loyvt at satsa alla íløguupphæddina upp á eitt og sama partabræv er hetta ikki loyvt í aktiuspælinum hjá Børsen. Har kanst tú í mesta lagi keypa partabrøv fyri 50.000 krónur í sama felagi og noyðist sostatt at gera íløgu í 5 ymisk feløg, um tú vilt keypa partabrøv fyri alla byrjunarupphæddina upp á 250.000 krónur.
- Lagt varð í okkara spælið upp til, at luttakararnir skuldu sleppa at satsa stórt. Tað síggja vit, at fremstu spælararnir hava gjørt, og vit síggja eisini, at aftastu spælararnir hava gjørt tað sama, men meðan fremstu spælararnir hava havt eydnuna við sær, hava aftastu spælararnir verið óhepnir, greiðir Jákup Petur Bærentsen, íløgurøktari hjá Kaupthing Banka frá.
Aftasti spælarin í Íløguspælinum hevur nevniliga mist 83 prosent av síni byrjunarupphædd, tað vil siga er vorðin næstan 830.000 krónur fátækari, og er komin niður





á 171.000 krónur. Hetta avspeglar væl tann váðan, sum ein íleggjari hevði havt í tí veruliga lívinum, um hann "legði øll eggini í somu kurv".
- Sum vit mæltu til, tá Íløguspælið byrjaði, so skuldi ein satsa stórt fyri at vinna spælið. Talan er um eitt spæl og tí mæltu vit til at gera íløgu í bert nøkur heilt fá pappír. Tað er júst tað, sum bæði fremsti spælarin og aftasti spælarin hava gjørt, vísir Jákup Petur Bærentsen á og leggur afturat, at í tí veruliga íløgulívinum verður nevniliga harðliga mælt frá til at leggja øll eggini í somu kurv.

**Skjótt upp og niður**
At skjótt kann ganga upp og niður í partabrøvum sannaði norðmaðurin John Frederiksen, tá hann í síðstu viku gjørdist 1,63 milliardir norskar krónur fátækari eftir einum degi. Epn.dk skrivar, at tað serliga vóru partabrøvini hjá honum í alifyritøkuni Marine Harvest Group á Oslo børsinum, sum stóðu í fríum falli, tá tey lækkaðu við 16,67 prosentum. Men John Frederiksen fær helst smør upp á breyðið komandi dagarnar kortini. Hann er ein tann ríkasti persónurin í Noreg og er mettur at eiga uml. 50 milliardir krónur.
Tað vóru tó ikki bara partabrøvini í Marine Harvest Group sum lækkaðu nógv í síðstu viku. Tað er longu kent, at Atlantic Petroleum stóð í fríum kursfalli í síðstu viku. Hetta hevði við sær, at kursurin, sum í byrjanini av vikuni hevði verið uppi á omanfyri 2500 krónum, fall heilt niður á niðanfyri 1700 krónur fríggjadagin – tað vil siga eitt fall upp á uml. 33 prosent eftir einari viku.

**Kvøld fyri tvey á Gourmet til vikuvinnaran í Íløguspælinum**
Sum kunngjørt fáa spælararnir, sum standa seg best í Íløguspælinum hvørja viku, vinningar frá Kaupthing Bank. Besti spælarin er tann, ið hevur havt størsta vinning í prosentum farnu vikuna. Vinningurin hesaferð er eitt gávukort fyri tvey til eitt kvøld við serligari vín- og matskrá frá Gourmet.

**Besti spælarin í viku 46:**
Raggyboy

Avkastið hjá vinnaranum hesa vikuna: kr. 439.905,00 (+40,09 %)

Vinnarin fær beinleiðis boð.

Hjartaliga tillukku
Kaupthing Bank

**Gongdin hjá topp 3** (vika 46)




**Topp 10** (19. nov. 2007 kl. 11.38)

| Leikari | Reiður peningur | Partabrævaogn | Ogn | Avkast |
|---|---|---|---|---|
| navijoe | 450,68 kr. | 2.924.450,00 kr. | 2.924.900,68 kr. | +192,49 % |
| Unn | 384,06 kr. | 1.621.323,00 kr. | 1.621.707,06 kr. | +62,17 % |
| Raggyboy | 2.441,50 kr. | 1.534.810,00 kr. | 1.537.251,50 kr. | +53,73 % |
| Thora | 92,63 kr. | 1.530.252,44 kr. | 1.530.345,08 kr. | +53,03 % |
| ek | 3.670,00 kr. | 1.524.600,00 kr. | 1.528.270,00 kr. | +52,83 % |
| Eggaba | 1.518.766,63 kr. | 0,00 kr. | 1.518.766,63 kr. | +51,88 % |
| TNT | 4.323,20 kr. | 1.502.872,00 kr. | 1.507.195,20 kr. | +50,72 % |
| Mazda323 | 764.968,83 kr. | 737.679,98 kr. | 1.502.648,81 kr. | +50,26 % |
| Lamai | 650,00 kr. | 1.498.575,00 kr. | 1.499.225,00 kr. | +49,92 % |
| igo84 | 941,94 kr. | 1.497.859,00 kr. | 1.498.800,94 kr. | +49,88 % |